norden
NORÐURLANDAHÚSIÐ

## Bókhaldari til Norðurlandahúsið

Norðurlandahúsið í Føroyum søkir eftir fólki at taka sær av dagliga bókhaldinum og øllum fíggjarligu uppgávunum hjá húsinum. Hetta er eitt áramálssett fulltíðarstarv. Starvið verður at seta 1. august 2011.

Vit hava brúk fyri einum dugnaligum fólki, sum kann taka sær av allari bókføringini og gera tær neyðugu fíggjarligu uppgerðirnar.

**Í høvuðsheitum væntar leiðslan, at bókhaldarin tekur sær av:**

- at føra bókhaldið
- at gera tíðarskeiðsroknskapir
- at gera ársroknskapin fyri stovnin
- at gera uppgerðir fyri verkætlanir
- at avgreiða kreditorar
- at avgreiða lønir og ferðauppgerðir
- at menna og samskipa innanhýsis mannagongdir á stovninum
- at hjálpa dagligu leiðsluni at gera fíggjarætlanir

Fyri tann rætta persónin er hetta eitt avbjóðandi, spennandi og mennandi starv, har ið tú arbeiðir rættiliga sjálvstøðugt, tó í tøttum samstarvi við arbeiðsfelagar í einum hugnaligum arbeiðsumhvørvi, har ið trivnaðurin er í hásæti.

Vit hugsa okkum, at tú hevur eina viðkomandi ástøðiliga útbúgving og hevur ávísar royndir á økinum at vísa á, og at tú hevur góðan málkunnleika í føroyskum, enskum og skandinaviskum máli.

**Løn og setanartreytir:**
Sambært reglum fyri stovnar undir Ráðharraráði Norðurlanda. Annars eftir sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið. Setanartíðin er 4 ár, við møguleika fyri longdari starvstíð – í mesta lagi 8 ár íalt.

Tey, ið ætla at søkja, skulu senda umsókn við prógvum og møguligum ummælum, so at hon er okkum í hendi í seinasta lagi mánadag 16. mai 2011. Vinaliga sendið umsóknina til:

**Norðurlandahúsið**
**Postrúm 1260**
**110 Tórshavn**

**Viðmerk »starv«**

**Stílað Niels Halm, stjóra**
**ella til starv@nlh.fo**

**Norðurlandahúsið** er stovnur undir Ráðharraráði Norðurlanda. Endamálið hjá Norðurlandahúsinum er at miðla norðurlendska mentan til Føroya og føroyska mentan til Norðurlond. Harumframt skal húsið stuðla føroyskum mentanarlívi í tøttum samstarvi við føroysk mentanarfólk. Í 2010 skipaði Norðurlandahúsið fyri góðum 300 tiltøkum, og húsið hevði uml. 50.000 gestir. Í húsinum starvast 15 fólk. Sí eisini www.nlh.fo

# Aðalfundur

Aðalfundur í Marte Meo felag Føroya
verður leygardagin 21. mai kl. 13.00.
á Virkni, Berjabrekku 2 Tórshavn.
Skrá sambært viðtøkunum felagsins.
**Nevndin**

# R.S. Service

**Er ein fyritøka, sum átekur sær allar tænastur fyri kundan:**

- **alt viðlíkahald**
- **umvælingar**
- **smiðjuarbeiði**
- **bátaumvælingar**
- **innstalatiónir v.m.**

**Eru kundunum til tænastu.**
**Einki ov stórt, einki ov smátt**

**R.S. Service er at hitta alt samdøgrið.**

**Ring á tlf. 22 65 12**






ÓKEYPIS útkoyring í Tórshavn FÓÐURSØLAN

**Kvalitetsfóður til kettur og hundar**

**Bílegg á telefon 50 20 22**

SKYTTENs hunda- og kettufóður er framleitt síðan 1970 og inniheldur fisk og hønsarunga.

**Fóðurið inniheldur ikki...**
- haldevni
- aromaevni
- litevni
- sojaprotein



Hundafóður 20 kg SPECIAL bert 450,-
Kettufóður 15 kg KAT bert 390,-

Tel. 50 20 22 · info@fodursolan.com · www.fodursolan.com

Eysturkommuna

## Leiðari til dagstovnin Gjáa í Gøtu

Søkt verður eftir leiðara til dagstovnin Gjáa í Gøtu at byrja 01. juli 2011.
Leiðarin hevur ábyrgdina av tí aðalmáli, ið er sett fyri stovnin, og av tí námsfrøðiliga virkseminum, ið verður gjørt.
Leiðarin hevur, í samstarv við Eysturkommunu, tað fíggjarligu og fyrisitingarligu ábyrgdina.
Starvið er 40 tímar um vikuna.
Um stovnin:

Í Gjáa arbeiða 4 námsfrøðingar og 9 hjálparfólk
Dagstovnurin Gjái lat upp 1. februar 2000. 52 børn eru á stovninum. Í dag eru 3 barnagarðsstovur, har børnini eru millum 2 og 5 ár.
Stovnurin liggur í barnavinarligum umhvørvi við Gøtugjógv.

**Førleikakrøv:**
- Námsfrøðiliga útbúgving og leiðsluroyndir

**Vit ynskja av tær:**
- at tú ert álítandi og hevur góð samstarvsevnir
- at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjøl-broyttan og tryggan gerandisdag
- at tú vilt vera við til at mynda og menna tað námsfrøðiliga umhvørvið

**Í dagliga arbeiðinum leggja vit m. a. dent á:**
- at børn og starvsfólk trívast og fáa avbjóðingar í gerandisdegnum
- at hava gott samstarv við foreldur og starvsfólk
- at skapa álit og tryggleika, bæði fyri foreldur og børn
- at virða tað einstaka barnið
- at ferðast nógv í náttúruni

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera Eysturkommunu, Postboks 30, 510 Gøta í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 06. mai 2011.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Inga Hansen, sosialdeildarleiðara, á telefon 73 00 14.

Almenn Ráðstevna um
**Kvinnur í ítrótti**
verður í Norðurlandahúsinum
hóskvøldið 5. mai. kl. 19:30
Sí meira á isf.fo

**Ítróttasamband Føroya**